# Politikkur viðvíkjandi áhugamálsósemjum

**Galdandi frá 09.02.2009 fyri verandi og nýggjar kundar**

## 1. Endamál

Hesin politikkur viðvíkjandi áhugamálsósemjum er galdandi fyri øll starvsfólk í BankNordik, sum veita íløgutænastur, íløguráðgeving ella annað í samband við íløgur. Hvør einstakur leiðari skal tryggja, at politikkurin, har hesin hevur týdning, er kendur og verður fylgdur.

Áhugamálsósemjur kunnu vera ímillum BankNordik og kundar ella innanhýsis millum kundar hjá BankNordik.

Endamálið við hesum politikki er at tryggja, at áhugamálsósemjur verða eyðmerktar, fyribyrgdar og handfarnar rætt. Harafturat hevur BankNordik innanhýsis mannagongdir á hesum økinum.

Um talan er um umstøður, har tað ikki ber til at sleppa undan áhugamálsósemjum, kunnar BankNordik kundan um handfaringina sum heild av áhugamálsósemjuni, áðrenn avtala verður gjørd við kundan.

## 2. Eyðmerking av áhugamálsósemjum

Áhugamálsósemjur kunnu vera til staðar í samband við ymiskar umstøður. Tað ber ikki til at lýsa allar hesar umstøður í hesum politikki.

Um BankNordik hevur ein annan áhuga enn kundin í samband við eina tænastu, sum verður veitt kundanum, kann talan verða um eina áhugamálsósemju. Eru áhugamálini hjá leiðsluni ella starvsfólkunum í stríð við áhugamálini hjá einum kunda, kann eisini verða talan um eina áhugamálsósemju. Sostatt er eitt nú talan um áhugamálsósemjur í hesum førum:

- Um BankNordik kann fáa fíggjarligan vinning ella sleppa undan fíggjarligum tapi fyri kundans rokning.
- Um BankNordik handlar fyri egna rokning samstundis sum bankin fremur ein handil vegna ein kunda.
- Um BankNordik hevur eitt annað áhugamál enn kundin í samband við ta tænastuna, sum bankin veitir kundanum ella verður framd vegna kundan.
- Um BankNordik antin hevur eina fíggjarliga ella aðra orsøk til at velja áhugamál hjá einum ávísum kunda ella kundabólki framum áhugamálini hjá einum øðrum kunda ella kundabólki.
- Um eitt starvsfólk hjá BankNordik hevur persónlig áhugamál í einum virðisbrævi, samstundis sum kundar bankans hava áhugamál í sama virðisbrævinum.
- Um BankNordik móttekur ella fer at móttaka eina samsýning frá øðrum enn kundanum í samband við ta tænastuna ella vøruna, sum bankin hevur veitt kundanum.

BankNordik skrásetir regluliga tey virksemi bankans, har ein áhugamálsósemja hevur verið ella har ein áhugamálsósemja kann koma, ið kann føra við sær munandi váða fyri kundans áhugamáli.

## 3. Fyribyrging og handfaring av áhugamálsósemjum

BankNordik skal reka sítt virksemi og handfara kundarnar rættvíst.

BankNordik hevur mannagongdir viðvíkjandi eyðmerking av teimum umstøðum, har talan kann verða um áhugamálsósemjur. Fyri at sleppa undan hesum umstøðum, hevur BankNordik:

- Mannagongdir sum krevja, at starvsfólkini altíð kunnu verða varug við møguligar áhugamálsósemjur og royna at sleppa undan hesum.
- Mannagongdir í samband við handfaring av kundaupplýsingum, sum tryggja, at kundaupplýsingar ikki verða spjaddir til onnur øki í bankanum enn tey økini, har upplýsingarnir skulu viðgerast.
- Mannagongdir sum áseta, at starvsfólk bankans, sum beinleiðis røkja áhugamál bankans, ikki samstundis kunnu ráðgeva kundum bankans.
- Innanhýsis leiðreglur viðvíkjandi starvsfólkahandlum við virðisbrøvum og øðrum fíggjarligum tólum, ið avmarka handilin hjá starvsfólkum.
- Innanhýsis leiðreglur sum áseta, at starvsfólk í bankanum ikki kunnu átaka sær uttanhýsis uppgávur ella størv, sum kunnu ávirka tey í samband við arbeiðið í bankanum.
- Innanhýsis frálæra av starvsfólkum, so tey eru før fyri at eyðmerkja møguligar áhugamálsósemjur og royna at sleppa undan hesum.
- Regluligt eftirlit fyri at tryggja, at hesin politikkur og tilhoyrandi mannagongdir verða yvirhildin í verki.

Deildirnar í BankNordik hava skyldu til at stovna, dagføra og skjalprógva mannagongdir í samband við eyðmerking, fyribyrging og handfaring av áhugamálsósemjum, og gera tey neyðugu tiltøkini fyri at tálma áhugamálsósemjum.

## 4. Compliance

Regluvørður bankans (compliance officer) hevur regluligt eftirlit við, at hesin politikkur og ásetingarnar í innanhýsis mannagongdunum hesum viðvíkjandi verða fylgdar í verki.

## 5. Broytingar í politikkinum

BankNordik gjøgnumgongur árlia politikkin viðvíkjandi áhugamálsósemjum og fremur neyðugu tillagingarnar fyri at tryggja, at politikkurin altíð er í samsvar við umstøðurnar og galdandi lóggávu. Broytingar og dagføringar eru galdandi frá og við tí degnum, tá hesar eru almannakunngjørdar á heimasíðu bankans. Tú fært ikki serliga fráboðan, tá politikkurin viðvíkjandi áhugamálsósemjum verður broyttur ella dagførdur. Bankin mælir tær tí til regluliga at kunna teg um broytingar í politikkinum viðvíkjandi áhugamálsósemjum á heimasíðu bankans.